# Havnar Bio

kall
Coca-Cola

UMMÆLI:

# Ein mordari millum okkum



**The Sentinel:**
**Leikandi:**
MICHAEL DOUGLAS
KIEFER SUTHERLAND
EVA LONGORIA
MARTIN DONOVAN
KIM BASINGER
Leikstjóri Clark Johnson.
Longd 108 minuttir.
Frumframførdur í Havnar Bio 8. september.

**FILMSUMMÆLI**
*Kim Simonsen*

Tað hevur ofta verið framt drápsroynd á amerikanskar forsetar. Longu Abraham Lincoln varð dripin. Hann var valdur inn í Kongressina í 1846. Seinni var ein annar sera elskaður forseti dripin, ið var John F. Kennedy. Tað er eitt amerikanst drama at vera forseti, og einki kann skapa meiri drama og samansvørjingartankar enn just slíkar søgur um morð á forsetan.

Filmurin The Sentinel er um agentin Pete Garrison (Michael Douglas), ið arbeiðir fyri Secret Service, ið stendur fyri at útbúgva vaktir til Hvíta Húsið, til amerikanska forsetan og teirra familjur.

Garrison er kendur, tí hann hevur einaferð tikið eina kúlu fyri forsetan, og bjargaði á henda hátt lívinum hjá forsetanum. Garrison er tí vældámdur og respekteraður millum starvsfelagar. Alt gongur sum tað skal. Her er ein fín skipan við planum, kortum, kotum og øllum sum skalt til. Men við eitt, so koma óhugnaligir loynidómar fram um at starvsfelagin hjá Pete, Charlie Merriweather, vil hava fund við hann, men hann verður skotin uttan fyri síni hús. Tey sum hava dripi hann royna at fáa tað at líkjast einum ráni, men alt er ikki rætt her.

Secret Service setur agentin David Breckinridge (Kiefer Sutherland) at uppklára hetta. Hann er ein sum hugsar nógv um reglur og paragraffir. Hesin var annars næmingur hjá Pete Garrisons og hevur verið ein av hansara vinum.

Ein annar egentur er Jill Marin (Eva Longoria), ið er ein framasøkin ung kvinna, sum just er útbúgvin frá Secret Service Academy, ið just byrjar sítt fyrsta arbeiði. Hon vil fegin tekkjast hesum Breckinridge, tí Garrison í einum fyrilestir hevur sakt henni, at Breckinridge er hin besti maðurin til slíkar uppgávur.

## So skal kannast

Filmurin "The Sentinel" er ein klasssiskur og undirhaldandi thrillari. Slíkir filmar eru ofta gjørdir fyrr, her er kapping millum starvsfelagar, spenningur og alt sum skal til. Her eru fleiri av teim heilt frægu leikarunum, ið ofta gera slíkar filmar sum Michael Douglas og Kiefer Sutherland. Øll fara í holt við at finna fram til fløkjur og loyndarmál. Tað vísir seg sjálvandi, at onkur innanifrá er sekur í øllum. Hetta er ikki hent í søguni hjá Secret Services í øll tey 141 árini, ið hesin stovnurin hevur verið til.

Søgan er heldur fløkt, men ein partur av gøluni er at fáa Garrison, at síggja út sum hann er skyldigur. Hann er tí sera illa fyri, serliga tí hann sjálvur ber eitt stórt loyndamál, ið hann vil fjala fyri ein og hvønn prís. Hann fjalir seg tí og í hølunum á honum eru bæði Breckinridge og Marin. Hann hevur ikki nógvar møguleikar tíð til at reinsa sítt navn, finna svíkjaran og ikki minst bjarga lívinum hjá forsetanum.

## Ein politiskur thrillari

"The Sentinel" er ein politiskur trillari um agentarnir, ið skulu verja lívi hjá amerikanska forsetanum, ið sjálvandi ikki er væl dámdur maður í hesum døgum, tí er hesin filmurin og søgan sjálvandi nakað, ið ikki er óhugsandi, men tó er hann alt for mainstream.

Michael Douglas kenna øll, hann hevur um trý ár verið spælt sjónvarp og film í 40 ár. Hann kom fram í 1969. Tá hann spældi í sjónvarpsrøðini San Franciscos gader. Hann hevur verið áhugaður í at framleiða filmar og hann var primos motor í filminum hjá Milos Formans "Gøgereden" (1975). Hann var eisini framleiðari á "Kinasyndromet"(1979), har hann spældi við sjálvur. Seinni sóu vit hann skifta ham og kom fram sum yuppie í Wall Street. Hann er kendur frá nógvum hálvvánaligum filmum, so sum "Dommeren ser rødt", (1983), "Nu går den vilde skattejagt" (1984) og "Farligt begær" (1987). Stuttligir filmar hjá honum er t.d. "The War of the Roses" (1989) og hin sera góði "Falling Down" (1993) og seinni í "Wonder Boys" (2000) og "Traffic" (2000).

Hin stóra stjørnan í filminum, Kiefer Southerland, hava vit sæð í filmum sum "24 timer", ið hevur koyrt uttan enda í áravís.

Við í "The Sentinel" er 80ara stjørnan og femme fatale Kim Basinger. Hon spælir kona forsetans.

Vit kenna hana frá freka filminum "9½ uge" (1985) og "L.A. Confidential" (1997).

Her eru nógv kend fólk í hesum filminum, hann er væl gjørdur og flott settur saman, men eg eri ikki nakar stóru thrillaratilhangari, haldi at hesin filmurin er gjørdur fyrr. Minti meg for nógv um ein part av "24 timer", um eg skal vera heilt erligur. Michael Duglas ger tað ikki ordeliga fyri hendan ummælaran.

Jú Lincoln varð dripin og Kennedy, ja og Bush er sjálvandi eitt sera relevant offur, men tó haldi eg ikki at The Sentinel er verdur at fara allan vegin í biograf fyri at sígga. Hann er góður at leiga á DVD ein sunnudag, har man hevur timburmenn og drekkur kola.

**3 stjørnur av 6**

TÍÐIRNAR: **Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**




**The Sentinel** *FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 08.09 | kl. 20.30 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 09.09 | kl. 20.30 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 10.09 | kl. 19.30 | kl. 22.00 |




**Biler**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 08.09 | kl. 18.00 |
| Leygardag | 09.09 | kl. 18.00 |
| Sunnudag | 10.09 | kl. 17.00 |




**Snakes on a plane**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 08.09 | kl. 22.30 |
| Leygardag | 09.09 | kl. 22.30 |
| Sunnudag | 10.09 | kl. 22.30 |




**Peter Pedal**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 08.09 | kl. 17.30 |
| Leygardag | 09.09 | kl. 17.30 |
| Sunnudag | 10.09 | kl. 17.30 |




**Sprængfarlig Bombe**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 08.09 | kl. 20.00 |
| Leygardag | 09.09 | kl. 20.00 |
| Sunnudag | 10.09 | kl. 20.00 |




**Miami Vice**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 07.09 | kl. 22.00 | *Seinasta sýning* |

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**